**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 155/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi** (Flyta kvotur yvir um ár)

Jørgen Niclasen, løgtingsmaður hevur lagt málið fram 7. mars 2019 og eftir 1. viðgerð 15. mars 2019 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum 26. og 28. mars 2019.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Føroya Reiðarafelag, Føroya Fiskimannafelag, Felagið Línuskip, P/f Jókin, Sp/f Kinnfelli og landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Høgna Hoydal.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Jørgen Niclasen, Bjørn Kalsø, Jákup Mikkelsen og Jógvan Skorheim) er komin eftir, at ein tilvísing vantaði í orðingini av greinini, soleiðis at hetta lógaruppskotið ikki, eins og ætlað, tekur hædd fyri at flyta ikki fiskaða menningarkvotu frá einum ári til annað. Meirilutin setir tí fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

Í § 1, nr. 1 verður "ikki fiskaður partur av egnari árskvotu sambært §§ 14-18, § 28 og § 34 kann flytast" broytt til: "ikki fiskaður partur av egnari árskvotu sambært §§ 14-18, § 28 og § 34 umframt menningarkvotu sambært § 60 kann flytast".

Við hesari broyting tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Bjørt Samuelsen, Bjarni Hammer og Ingolf S. Olsen) heldur, at aðalreglan má vera, at veiðirættindi verða gagnnýtt í tí árinum, tey eru latin til. Hetta við atliti til altjóða fiskivinnusamráðingar og samráðingarpartarnar, har tað er umráðandi, at Føroyar fiska ásettu kvotuna, og bert loyva avmarkaðari flyting yvir um ár. Eisini kundi ein standandi heimild møguliga elvt til óhepna tilrættislegging av fiskiskapinum.

Minnilutin vísir annars til løgtingsmál nr. 126/2018 frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, ið ásetir loyvi at flyta kvotur frá 2018 til 2019.

Minnilutin tekur tí ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 24. apríl 2019**

| | | |
|---|---|---|
| Bjørt Samuelsen<br>formaður | Jørgen Niclasen<br>næstformaður | Bjarni Hammer |
| Ingolf S. Olsen | Bjørn Kalsø | Jákup Mikkelsen |
| | Jógvan Skorheim | |